# Hansina í Leikalund

**Fríggjadagin, 3. september kl. 16.00, letur Hansina Iversen, listakvinna, upp framsýning í Leikalund. Við á framsýningini eru 17 nýggj verk**

LISTAFRAMSÝNING

Hansina Iversen málar abstrakt. Við stórum strokum og fínum litum skapar hon hugvekjandi, ofta heilt stórar myndir, á einum tekniskt sera høgum støði. Myndirnar hjá Hansinu lata áskoðaran fáa lut í einum egnum innara alheimi, har tú kanst droyma teg burtur eina løtu.

## Smærri málningar

Málningarnir, ið Hansina sýnir fram í Leikalund, eru smærri enn teir, vit annars kenna hana fyri. Hetta kemst av, at at tað ikki ber so væl til at hanga heilt stórar málningar upp í gomlu handilshølunum í Leikalund. Hetta tekur Hansina tí sum eina avbjóðing.

- Vanliga arbeiði eg við stórum løriftum. Penslastrokini fevna longur enn ein favn, og bera kenslu av fysiskum rørslum. Smáu løriftini hava at byrja við lyndi til at konsentrera seg um høvdið, men sum frálíður, søkkur hugaheimurin inn í myndaevni, og støddin hevur ikki so stóran týdning longur, sigur Hansina um nýggju verkini, sum verða sýnd fram í Leikalund.



## Drúgvar royndir

Hansina Iversen er fødd 1966 í Tórshavn, og hon hevur holla útbúgving innan list og drúgvar royndir sum listakvinna. Frá 1989 - 93 varð hon á Listaháskúla Íslands og frá 1993 - 97 á Listaháskúla Finlands í Helsinki.

Hansina hevur havt egnar framsýningar í Danmørk, Finlandi og á Listasavni Føroya. Harafturat hevur hon luttikið á mongun framsýningum í Íslandi, Finlandi, Danmørk, Frankaríkið,Týsklandi, Sviaríki og Litaua. Í 2000 luttók Hansina á Várframsýningini á Charlottenborg. Verk eftir Hansinu Iversen eru millum annað at síggja á Listasavni Føroya.

Framsýningin í Leikalund er opin allan september mánaða.

Leikalund hevur opið soleiðis:
Mánadag - fríggjdag: 10.00-23.00
Leygardag: 10.00-13.00 og 19.00-23.00
Sunnudag: 19.00-23.00

**ave**




# Nú eru tveir kommunulæknar á Sandi

KOMMUNULÆKNI

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum hevur sett Sigrid Nónsgjógv, lækna í starv sum kommunulækni í Sandoyar Læknadømi.

Sigrid Nónsgjógv, sum er 50 ára gomul, er útbúgving lækni og fekk serlæknaviðurkenning innan almen medisin í 1999.

Sigrid Nónsgjógv hevur fyri tað mesta starvast uttanlands, men hevur tó í fleiri umførum starvast sum avloysari fyri kommunulæknar ymsa staðni í Føroyum.

Sigrid tekur við starvinum mánadagin.

**Til sølu**



**Audi A6 2,5 TDI**
· árg. 2000
**Til sølu um hóskandi boð fæst**

**Mitsubitshi Carisma DID**
· árg 2002
**Til sølu fyri 140.000,-**

**TEL 21 46 72**